# Føroyar eru skotskar

Bretska mótablaðkvinnan og antropologurin Wendy Scott skipaði fyri pallborðsfundinum um móta á Funky Faroe Islands. Hon segði eftir mótasýningina mikudagin, at hon var errin at luttaka á hesum tiltakið, tí støðið á føroysku sniðunum var so høgt. Men hennara samskipan av tiltakinum kom ikki av tí, at hon hevði nakað tilknýti til Føroyar áðrenn Funky Faroe Islands. Tá íslendski tónleikasamkiparin á tiltakinum Anna Hildur Hildibrandsdóttir spurdi Wendy Scott, um hon vildi samskipa eina ráðstevnu um móta úr Faroe Islands, svaraði Wendy Scott, at tað vildi hon fegin, tí hon var uppvaksin so tætt við Skotland, at hon gjarna vildi arbeiða við onkrum skotskum. Á pallborðsfundinum týsdagin, greiddi hon frá, at hon var vælvitandi um, at hetta var pínligt fyri ein antropolog, men hon hevði veruliga ongantíð hoyrt um Faroe Islands og, at hon tí blandaði við Fair Isle.

**nud**



Antropologurin og mótablaðkvinnan Wendy Scott helt Føroyar vera í Skotlandi

mynd: nud

## HITLIST

**15 tær bestu** (ÚF)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | The Dreams | Sasa Sa, Sa |
| 2 | Eb/Streymur | E/B Streyma Sangurin |
| 3 | Evanescence | Call Me When You're Sober |
| 4 | Rihanna | Unfaithful |
| 5 | Panic! At The Disco | I Write Sins Not Tragedies |
| 6 | Marius | The Sky Is Our Home |
| 7 | Justin Timberlake | SexyBack |
| 8 | Nephew | Igen & Igen & |
| 9 | Outlandish | I Only Ask Of God |
| 10 | Fergie | London Bridge (Oh Shit) |
| 11 | Teitur | Hitchiker |
| 12 | Týr | Wings Of Time |
| 13 | Muse | Starlight |
| 14 | Scissor Sisters | I Don´t Feel Like Dancin' |
| 15 | Nik & Jay | Boing |

**Eykaløg**

| | |
|---|---|
| Galaxy ft. DeeJay | Fell In Love With An Alien |
| P. Diddy ft. Nicole Scherzinger | Come To Me |
| Jokeren | Gravøl |
| Meat Loaf ft. Marion Raven | It's All Coming Back To Me Now |
| 200 | Exodus (2015) |

**Tjeklisten** (DR)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Nephew / Igen & Igen & | |
| 2 | Scissor Sister | I Don't Feel Like Dancin' |
| 3 | Muse | Starlight |
| 4 | Basshunter | Boten Anna |
| 5 | Kashmir | Kalifornia |
| 6 | Outlandish | I Only Ask Of God |
| 7 | Jokeren ft. L.O.C & Niarn | Gravøl |
| 8 | Alphabeat | Fascination |
| 9 | Justin Timberlake | SexyBack |
| 10 | TV2 ft. Anne-Stine | Kontoret Lukker Nu |
| 11 | Oh No Ono | Practical Money Skills For Life |
| 12 | Nelly Furtado ft. Timbaland | Promiscious |
| 13 | Killers | When We Were Young |
| 14 | Nordstrøm | Gi' Besked |
| 15 | Evanescence | Call Me When You're Sober |
| 16 | Rasmus Nøhr | Lykkelig Smutning |
| 17 | Broken Beats | Essentials |
| 18 | Chamillionaire ft. Krayzie Bone | Ridin' |
| 19 | Gnarls Barkley | Smiley Faces |
| 20 | Red Hot Chili Peppers | Tell Me Baby |

**Top of the Pops** (BBC)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | My Chemical Romance | Welcome To The Black Parade |
| 2 | Razorlight | America |
| 3 | Scissor Sister | I Don't Feel Like Dancin' |
| 4 | Bob Sinclair | Rock This Party (Everybody Dance Now) |
| 5 | P. Diddy ft. Nicole Scherzinger | Come To Me |
| 6 | Lil' Chris | Checkin' It Out |
| 7 | Beatfreakz | Superfreak |
| 8 | The Killers | When You Were Young |
| 9 | Justin Timberlake | SexyBack |
| 10 | David Hasselhoff | Jump In My Car |
| 11 | Lily Allen | LDN |
| 12 | Nelly Furtado ft. Timbaland | Promiscious |
| 13 | Shakira ft. Wycleaf Jean | Hips Don't Lie |
| 14 | Snow Patrol | Chasing Cars |
| 15 | Cascada | Everytime We Touch |
| 16 | Evanescence | Call Me When You're Sober |
| 17 | Cast Of High School Musical | Breaking Free |
| 18 | Pussycat Dolls | I Don't Need A Man |
| 19 | Fratellis | Chelsea Dagger |
| 20 | James Morrison | Wonderfull World |

**Billboard**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Justin Timberlake | SexyBack |
| 2 | Ludacris ft. Pharrell | Money Maker |
| 3 | Hinder | Lips Of An Angel |
| 4 | Akon ft. Eminem | Smack That |
| 5 | The Fray | How To Save A Life |
| 6 | Snow Patrol | Chasing Cars |
| 7 | Young Jibbs | Chain Hang Low |
| 8 | JoJo | Too Little Too Late |
| 9 | Weird Al Yankovic | White & Nerdy |
| 10 | Nickelback | Far Away |
| 11 | Fergie | London Bridge |
| 12 | Evanescence | Call Me When You're Sober |
| 13 | Justin Timberake ft. T.I. | My Love |
| 14 | The Killers | When You Were Young |
| 15 | Chingy Ft, Tyrese | Pullin' Me Back |
| 16 | Danity Kane | Show Stopper |
| 17 | Chris Brown | Say Goodbye |
| 18 | The Pussycat Dolls Ft. Snoop Dogg | Buttons |
| 19 | Nelly Furtado Ft. Timbaland | Promiscuous |
| 20 | Beyonce | Ring The Alarm |

sound

# Teitur T-troyggja í amerikonskum filmi



Teitur spældi á Funky Faroe Islands

mynd: nud

Teitur hevur seinastu árini skrivað nógvan tónleik til amerikanskar filmar millum aðrar biografaktuella My Super Ex-Girlfriend. Men í hesum døgum verður ein filmur tikin upp í New York, har Teitur fær eitt rættiliga stórt sonevnt product placement heilt ókeypis. Tá Teitur og hansara bólkur herfyri spældu í Los Angeles, var ein amerikanskur filmstjóri á konsertini. Aftaná konsertina hitti filmstjórin Teit og bólkin, lagið var gott og menn gjørdust væl, so mikið væl, at áðrenn kvøldið var av, hevði filmstjórin skrivað filmin um, soleiðis at ein av leikarunum, nú er ílatin eina Teitur T-troyggju allan filmin. Christian Ulf-Hansen umboðsmaður hjá Teiti, sigur at filmstjórin fekk 10 Teitur T-troyggir við sær.



Umboðsmaðurin hjá Teiti Christian Ulf-Hansen luttók á pallborðsfundinum á Funky Faroe Islands

mynd: nud

**nud**

# Sigur Rós gevur plátufelagið eina ókeypis útgávu

– Tað er ikki altíð tann sáttmálin, sum ljóðar at hava størstu upphæddina í krónum og oyrum, ið er tann besti sáttmálin, hetta segði John Best umboðsmaður hjá íslendska bólkinum Sigur Rós, vera orsøkina til, at bólkurin velur at geva plátufelagnum Roughtrade eina fløguútgávu við bólkinum heilt ókeypis. Sigur Rós stendur fyri upptøkum og fyri at ljóðblanda fløguna. Roughtrade tekur sær av sølufremjan og rindar fyri konsertferðina hjá bólkinum, og eigur so rættindini fyri útgávuna í Evropa. Plátufelagið fær sostatt allan peningin. fyri seldar fløgur.

– Fyri okkum tykist tað rætt fyri yrkisleiðina hjá bólkinum, at geva hana út á júst hesum plátufelagið, tí tað kann hjálpa okkum víðari, greiddi John Best frá.



John Best er manegari hjá Sigur Rós, her situr hann saman við Annu Hildur Hildibrandsdóttir tónleikasamskipara á Funky Faroe Islands

mynd: nud

**nud**



Uppaftur fleiri høvdu sætt sniðini hjá Barbara í Gongini og hinum, um Funky Faroe Islands ikki lá júst hesar dagarnar.

# Mótaheimurin var burturstaddur

Meðan fyriskipanin av Funky Faroe Islands tyktist sera góð, so var dagfestingin á tiltakinum sambært enska mótaheiminum sera óheppin. Størsta mótamessan í heiminum hevur júst verið í Paris, og fleiri tiltøk vóru eisini farnu viku í Paris. Hetta merkir, at nærum allur enski mótaídnaðurin er burturstaddur. Bæði Wendy Scott samskipari og Hilary Riva forkvinna í British Fashion Counsil, søgdu, at tær mettu hetta sum verandi rættiliga óheppið fyri tiltakið.

- Eg haldi hetta vera nokkso óheppið, tí fólk vóru veruliga áhugaði, tá eg ringdi runt og bað tey koma á mótasýning úr Føroyum, men tey eru bara ikki í Bretlandi, segði Wendy Scott.

**nud**